Dagf. 17. desember 2021
HMR J. nr. 21/26723-4

Kaj Leo Holm Johannesen
landsstýrismaður

Spurningurin var soljóðandi:

1. Nær verður verklagslógin fyri læknahúsini (Gula húsið) løgd fyri Løgtingið?
2. Hvørjar forðingar eru fyri, at lógin kann leggjast fyri Løgtingið?
3. Nær kann væntast, at arbeiðið at dagføra læknahúsini byrjar?
4. Nær verður starvsfólkabygningurin dagførdur?

Svar:

Til spurning 1
Eftir ætlan verður verklagslógin løgd fyri Løgtingið fyrst í komandi ári.

Til spurning 2
Mett verður ikki, at tað eru forðingar fyri, at lógaruppskotið kann verða lagt fyri tingið.

Til spurning 3
Í byrjanini í 2022 væntast arbeiðið at verða boðið út. Tá ið verklagslógin er samtykt, kann arbeiðið fara í gongd. Játtan er tøk til endamálið.

Til spurning 4
Arbeiðið við starvsfólkabygninginum er ikki komið so langt ávegis enn. Her er fyrsta stigið at viðgera hugskot til m.a. innrætting.

Heilsumálaráðið, 17. desember 2021

Kaj Leo Holm Johannesen
landsstýrismaður